## Svínoy leggur saman við Klaksvík

Klaksvíkar Kommuna boðar á heimasíðu sínari frá, at borgarafundur verður úti í Svínoy í kvøld, við atliti til kommunusamanlegging. Ein komandi samanlegging væntast at fáa gildi 1. januar 2009, tá eitt felagsvalt býráð fer at hava ábyrgdina og umsitingina av sameindu kommununi. Svínoyar kommunustýri og Klaksvíkar býráð hava samstundis tikið avgerð um, at kommunurnar frá undirskrivingardegnum at rokna fara undir eitt tætt og miðvíst samstarv. Klaksvík.fo sigur endamálið við hesum samstarvi vera, at fyrireika sjálva samanleggingina og at skipa soleiðis fyri, at borgarar í báðum kommunum longu frá undirskrivingardegnum skulu gerast tilvitaðir um, at kommunurnar leggja saman, eftir at verandi valskeið er lokið.



## Stagedivin'G á G!

Marianna Mørkøre, sum tekst við móta, films- og fotolist, skipar í samstarvi við G! Festival og Outsider Magazin fyri forvitnisligum films- og bókmentatiltaki. Møguleiki er fyri at síggja, hoyra og uppliva ymisk sløg av nýggjari list, bæði føroyskari og útlendskari. Hetta spennandi tiltakið verður leygardagin, 21. juli kl. 15 í backstage høllini, G!ult, ið er omanfyri Tøting. Tiltakið er opið fyri øllum, og ókeypis er fyri festivalgestir. Fólk uttan festivalpass gjalda 100 kr. fyri at koma inn.

# Kanningin ikki so vísindalig kortini

**Tað hava verið nógvar atfinningar mótvegis teirri kanningini, sum vit umrøddu í Sosialinum fyrr í vikuni. Har varð sagt, at um ikki umfatandi broytingar vórðu settar í verk, fór veiði eftir villini fiski at steðga áðrenn 2050. Men tað eru langt frá øll samd við granskarunum**

FISKIRØKT

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni prentaðu vit eina grein um ovurfisking og dálking, sum sambært einari kanning frá november í fjør fer at føra til, at eingin villfiskur verður eftir at veiða í ár 2050, verða ikki umfatandi tiltøk sett í verk.

Tað var tíðarritið Science, sum av fyrstan tíð bar tíðindini um hesa kanningina, og síðani hevur frágreiðingin og niðurstøðan ferðast heimin runt, uttan at nevnivert av kritiskum spurningum og viðmerkingum eru slopnar framat.

Ein teirra, sum ikki er samdur við hesi niðurstøðuni, er Alan Longhurst. Hann hevur latið inn eina góðkenda viðmerking, har hann vísir á fleiri feilir við kanningini og serliga á tí hagtalsgrundarlagi, sum kanningin byggir á.

Í átta síður longu viðmerkingini vísir Longhurst á heilar sekstan keldur, sum allar eru ivasamar um niðurstøðuna hjá Boris Worm og hansara starvsfeløgum.

Longhurst sigur, at hóast fleiri fiskifrøðingar og fólk annars innan fiskiídnaðin eru ósamd við niðurstøðuni og kanningini sum heild, er ikki ein tann einasta atfinningarsom viðmerking sloppin við í tíðarritið Science, og tað er rættiliga undrunarvert og illgrunasamt.

Hagtalsgrundarlagið, sum granskingarbólkurin hevur fingið frá FAO-goymslunum, eru ikki heilt álítandi. Sjálvur vísir Longhurst á eina røð av mistøkum, sum granskarabólkurin hevur gjørt. Hetta er í størstan mun orsakað av, at kanningin konsekvent byggir á biomargfaldni í økinum og einki annað. Hetta argumentið er bygt á royndir á fjøruøki og síðani bara flutt út á strandahøv.



*Fleiri fiskifrøðingar eru ósamdir við kanningarúrslitini og niðurstøðurnar hjá Boris Worm og starvsfeløgum hansara. Og sambært Alan Longhurst er vandin fyri tómum trolum eftir ár 2050 ikki so stórur, sum kanningin annars vil vera við*

### Aðrir skeivleikar

Við at nýta veðurfrøðina í royndarúrslitum, sum eru fingin til vega við fjøru-ecoskipanum og kunngjørdar í 16 vísindaligum tíðarritum frá 1960 til 1995, er niðurstøðan hon, at eitt ríkt plantlív á botni mennir støðufesti í ecoskipanini, har hetta er skilgreinað sum »evnini at standa ímóti áhaldandi órógvi«. Men tær 20 ávísingarnar nýttar at undirbyggja hesa niðurstøðuna eru fingnar til vega við kannningarstovuúrslitum ella ástøðiligum manipulatiónum av fjørusløgum. Í hesum førinum bert bygt á sjógras.

Longhurst heldur tað vera ov lætt farið um, bert at framrokna slík úrslit til at galda á opnu strandahøvunum, serliga tí bert eitt av teimum tólv kannaðu økjunum kann roknast sum strandahav. Restin eru víkir og firðir.

Eisini fílist Longhurst á, at tað er ógvuliga trupult hjá lesaranum at finna út av, hvar stóra rúgvan av hagtølum stavar frá, og má tí nýta annað uppfylgjandi tilfar at fáa greiði á hesum.

Granskarabólkurin ger síðani tað, at hann framroknar úrslitið fyri strandahøvini – ið jú sum kunnugt er ein framrokning av úrslitinum av fjørukanningini – til stóru heimshøvini, og har byggja tey eisini á skeivt grundarlag, sigur Longhurst.

Umframt hetta tekur Longhurst sum dømi, at bólkurin roknar við 725 ymsum fiskasløgum í Guineiska Golfinum, hóast tað bert verða fiskað 200 sløg av fiski, harav 17 umboða minni enn 0,1% av fiskiskapinum. Nógv tey flestu sløgini halda til á so djúpum vatni, at hugsingur er ikki um at royna eftir teimum. Og tá má væl vera trupult at tosa um ovurveiði.

Vit ætlaðu at fáa eina viðmerking frá Hjalta í Jákupsstovu, men hann bar seg undan við teirri grundgevíng, at umrødda kanningin var tengd at stórari óvissu, og at hann ikki nóg gjølla hevði sett seg inn í umrøddu kanning.

Men tað kann í hvussu er staðfestast, at langt frá øll – og tað er serliga galdandi fyri fiskifrøðingar og fólk innan fiskiídnaðin – eru samd við kanningarúrslitunum og niðurstøðunum hjá Boris Worm og starvsfeløgum hansara.

# Endurgjald fyri seismikk

**Norska Olju- og orkumálaráðið hevur nú viðgingið, at seismikkur ávirkar fiskiskapin hjá útróðrarflotanum,og vil tí veita endurgjald fyri mista inntøku**

FISKIVEIÐI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri minni enn viku síðani var ført fram, at tað var seismikkurin, sum var ein stór orsøk til, at svartfuglurin við Føroyar er í minking. Nú hava norðmenn viðgingið, at sami seismikkur eisini ávirkar fiskastovnarnar. Tað skrivar norska fiskaríblaðið Fiskaren.

- Tað eri eg feginum. Tað er ófórt, at staturin nú viðgongur og gevur endurgjald fyri seismikk. Fyribils tykist tað tó, sum ætlanin ikki er nóg víðgangandi. Tað besta hevði verið víðarifevnandi loysn, tí tað er ikki bert hin einstaki fiskarin, men eisini ídnaðurin á landi, sum svíður fyri minkaða fiskiskapin. Men tað er kortini ógvuliga nøktandi, at vit eru komnir so langt, sigur formaðurin í Nordlands Fylke Fiskerlag, Tom Tobiassen.

Hann metir tó ikki, at tað fer at verða lætt hjá fiskimonnunum at søkja um endurgjald og skjalprógva tap.

- Serliga skjalprógvanin verður trupul. Vit hava arbeitt við at skjalprógva framferðarháttin og veiðina, sigur Tobiassen, men tað fáa vit ikki gjørt til lítar, fyrr enn vertíðin er av.

Hann heldur at besta loysnin hevði verið, at oljufeløgini og staturin leyskeyptu útróðrarbátarnar, meðan seismikkurin varð skotin.

Tað eru serliga útróðrarbátarnir og ídnaðurin á landi, sum líða undir tapi, og serliga smærru bátarnir.



*Norðmenn veita nú endurgjald fyri, tá skip skjóta seismikk*

Vit vildu helst avmarka seismikkin so nógv sum gjørligt, men bæði oljufeløg og fiskiídnaðurin skulu liva saman. Og samanlíkna vit við støðuna í Norðsjónum, eru vit komnir væl á leið. Í so máta er tað ógvuliga positivt, sigur Tom Tobiassen við Fiskaren.